## Pedagogtrot í Grønlandi

Tað er stórur tørvur á pedagogum í Grønlandi, og sambært kringvarpinum í Nuuk vanta meiri enn 300 pedagogar í løtuni. Kringvarpið nevnir sum dømið stovnin Timmiaaqqat í Nuuk, sum hevur barnagarð og vøggustovu. Har eru átta pedagogstørv, men bara fýra eru sett. Úrslitið er, at stovnurin noyðist at brúka vikarar, og tað er ørkymlandi fyri børnini, tí børnum dámar best, at tað eru tey somu, sum eru um tey, sigur sigur varaleiðarin, Bente Hare Hansen, við KNR.



## 3.000 uppsagnir hjá SAS

Í enn einari roynd at bjarga felagnum hevur SAS gjørt av, at 3.000 fólk skulu sigast úr starvi. Tað er ikki bara starvsfólkatalið, sum verður skert, tí SAS hevbur eisini gjørt av at niðurleggja 10 prosent av teimum stuttu rutunum, samstundis sum tey størru flogførini fækka munandi. Tað merkir, at samanlagt verða ruturnar skerdar 40 prosent, sigur DR. Orsøkin til tiltøkini er, at SAS hevði eitt stak vánaligt rakstrarúrslit í fjør við 4,4 milliardum krónum í halli samanborið við 443 milliónir krónur í avlopi í 2007.



*Hóast Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, er firtin inn á norðmenn og harmast støðuna, sum flakatrolararnir komu í, er hann nøgdur við endaliga fiskirættindasáttmálan við Noreg*

# Vestergaard skeldar norðmenn

**Nú ein fiskirættindasáttmáli er komin upp á pláss millum Noreg og Føroyar, kundi verið líkt til, at málið er liðugt. Men tað er tað ikki. Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, fer nevniliga innan tríggjar mánaðir at taka óhepnu støðuna, sum var til samráðingarnar, upp við norska fiskimálaráðharran**

FISKIRÆTTINDASÁTTMÁLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast nýggjur fiskirættindasáttmáli er funnin millum Føroyar og Noreg, er Jacob Vestergaard ikki nøgdur við framferðina hjá norðmonnum, sum tóku makrelin á skránna, hóast hann ikki var settur á upprunaligu skránna.

- Vit fara at taka hetta upp politiskt, tí vit mugu syrgja fyri, at samráðingar millum tvey lond verða hildnar á jøvnum føti. Eg fari at tosa við fiskimálaráðharran í Noregi, har eg fari at greiða henni frá, at hetta als ikki er nøktandi, og at framtíðarsamráðingar ikki mugu enda soleiðis, sigur Jacob Vestergaard. Sum í gjár harmaðist gíslastøðuna, sum føroyskir flakatrolarar hava verið í síðan 9. januar, tá upprunaligu samráðingarnar slitnaðu. Hetta hevði við sær, at ongin avtala var millum londini, og tí vóru skipini rikin úr økjunum hjá hvørjum øðrum.

### Nøgdur við úrslitið

Hóast Jacob Vestergaard er firtin inn á norðmenn um framferðarháttin til samráðingarnar, so er hann nøgdur við endaliga úrslitið, hóast hetta hevði við sær, at føroyingar slakaðu fyri makrelkravinum, tí hetta gav nøkur tons eyka í hinum endanum. Samstundis er makrelavtalan bara galdandi fyri í ár.

Avtalan inniber, at føroyingar sleppa at fiska 120 tons av hýsu og 97 tons av toski afturat í norskum sjógvi, men kvotan, ið vanliga kundi flytast úr russiskum sjógvi í norskan er minkað við umleið 500 tonsum. Eisini er avgjørt, at norðmenn fáa 4000 tons minni av svartkjafti í føroyskum sjógvi.

Norðmenn sleppa hinvegin at veiða júst tað sama, teir fyrr hava veitt í føroyskum sjógvi. Umframt, at teir fingu sín vilja við makrelinum, sum sampakkar við lutfallið, sum Føroyar og Noreg hava ímillum sín í Strandalandahøpi.

# Arbeiðsloysið tvífaldað

**Sambært hagtølunum hjá ALS, eru 749 fólk arbeiðsleys í løtuni. Tað er meir ein tvífalding síðan januar mánað 2008, og er talið hækkað við 200 fólkum síðan januar 2009. Kortini er arbeiðsloysið í Føroyum mett at vera sera lágt**

ARBEIÐSLOYSI
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Nýggjastu tølini hjá ALS vísa, at 749 fólk í Føroyum eru arbeiðsleys. Tað er næstan 200 fleiri enn skrásett vóru fyri einum mánað síðan, og meir enn ein tvífalding av talinum av arbeiðsleysum, skrásett fyri einum ári síðan, tá 308 fólk vóru skrásett sum arbeiðsleys í skipanini hjá ALS.

Tey flestu, ið ganga arbeiðsleys í løtuni, eru búsitandi í Suðurstreymoy, og fleiri menn enn kvinnur eru arbeiðsleys. 406 menn og 343 kvinnur. Í Norðoyggjum og Vágum eru tølini kortini nakað øðrvísi. Í Norðoyggjum eru 93 kvinnur arbeiðsleysar, og 75 menn. Í Vágum eru 16 menn arbeiðsleysir og 37 kvinnur.

Tey flestu arbeiðsleysu eru at finna í aldursbólkinum 20-29 ár. Av teimum 749 fólkunum, eru 182 at finna í hesum aldursbólkinum.

Sambært nýggjastu hagtølunum á Hagstovu Føroya, er arbeiðsloysisprosentið rættiliga lágt. Seinasta metingin er frá desember mánaði, tá arbeiðsloysið varð mett til 1,8 prosent. Tað er ein munandi hækkan frá summarmánaðunum, tá arbeiðsloysisprosentið lá á 1,1 prosent.

Aðra staðni verður mett, at arbeiðsloysi undir trý prosent verður ikki mett sum arbeiðsloysi.

